So sum so við skeltunum hjá landsverkfrøðinginum

Uttan fyri arbeiðstíð ber til at koyra 80 km/t í aðrari síðuni á vegnum Millum Fjarða, meðan arbeiðsskelti gera vart við, at ikki er loyvt at koyra skjótari enn 60 og 40 km/t í hinari síðuni á vegnum.

HILMAR JAN HANSEN

At trygdin er í lagi, tá menn gera vegarbeiði, man valla nakar hava nakað ímóti. Tí verða eisini vegskelti brúkt, sum skulu minna tey koyrandi á, at nú skulu tey vísa ansni, tí fólk arbeiðir á fram við vegnum.

Ikki er tó altíð, at virðingin fyri hesum skeltum er nóg stór, og javnan uppliva teir, sum arbeiða hjá landsverkfrøðinginum, at bilar framvegis koyra sínar 80 km/t, hóast skeltini biðja teir slaka ferðina niður í 60 ella 40 km/t.

Eitt av teimum støðum, har arbeitt hevur verið upp á vegin í langa tíð, er Millum Fjarða í Eysturoynni. Arbeitt hevur verið við at breiðkað og eisini flutt vegin millum Norðskálabergholið og Skálabotn.

Men at virðingin fyri arbeiðsskeltunum ikki altíð er tann størsta í arbeiðstíð, kann so sanniliga eisini skyldast, at tað er so sum so við skilinum á hesum skeltum, tá ikki verður arbeitt.

Í longri tíð hevur einki høpi verið við skeltingini Millum Fjarða um vikuskiftini og eisini eftir arbeiðstíð mitt í viku. Bert, tá arbeitt verður, eru skeltini í samsvar við tað, sum annars fer fram á leiðini.

Tá koyrt verður út móti Skálabotni, standa tvey skelti, har tað fyrra sigur, at mest loyvda ferðin er 60 km/t og tað seinna 40 km/t. Hetta er eisini, sum tað eigur at verða, tá arbeiðið er í gongd, men einki annulerandi skelti kemur, so bilarnir vita ikki, nær teir aftur kunnu fara upp á 80 km/t.

Tað, sum ger hesa søgu heilt stuttliga, er skeltingin í hinari síðuni á vegnum. Har stendur einki um 60 ella 40 km/t, tá koyrt verður inneftir úr Skálabotni. Men inni við Oyndfjarðarvegin stendur brádliga eitt annuleringsskelti.

– Eg veit ikki, um hetta skelti kanska merkir, at eg kann loyva mær at koyra skjótari enn 80 km/t, sigur ein bilførari, ið dagliga koyrir báðar vegir eftir hesum vegateini, men sum ikki dugir at síggja høpið í skeltingini.

– Og eisini sær tað ógvuliga løgið út, at tú í aðrari síðuni á vegnum bert mást koyra 40 km/t, meðan tú alla tíðina kanst møta bilum, ið hava loyvi at koyra 80 km/t.

Tá koyrt verður út móti Skálabotni, standa tvey skelti, har tað fyrra sigur, at mest loyvda ferðin er 60 km/t og tað seinna 40 km/t, men einki annulerandi skelti kemur, so bilarnir vita ikki, nær teir aftur kunnu fara upp á 80 km/t, men...

Myndir: Hilmar Jan Hansen

...í hinari síðuni á vegnum stendur einki um 60 ella 40 km/t, tá koyrt verður inneftir úr Skálabotni, men inni við Oyndfjarðarvegin stendur brádliga hetta annuleringsskelti

Ljóðar løgið

Vakthavandi á Politistøðini í Runavík heldur eisini, at hetta ljóðar løgið, men vísir á, at uppseting av skeltum hjá Landsverkfrøðinginum altíð skal verða gjørd í samráð við politiið.

– Tað kann sjálvandi vera, at teir í hesum føri hava gloymt at sagt okkum frá. Handan skeltingin ljóðar løgin, hóast eg má viðganga, at eg ikki havi lagt til merkis, at tað er loyvt at koyra við einari ferð øðrumegin og einari aðrari ferð hinumegin á vegnum, sigur hann.

– Men nú má eg fara ein túr framvið, so eg kann síggja, hvussu vorðið er við hesum skeltunum. Onkuntíð gloyma teir at siga okkum frá, og tá kanska okkurt kann koma at standa skeivt fyri fram við vegnum. Hatta ljóðar annars ikki sum nakað, vit høvdu góðtikið.

Jólsvein Joensen frá Landsverkfrøðinginum, sum hevur ábyrgdina av arbeiðinum Millum Fjarða, heldur tað vera forsømilsi, at slíkt mistak kann koma fyri.

– Í arbeiðstíðini eru skeltini í lagi, tí tað havi eg sæð fleiri ferðir sjálvur, sigur hann.

– Men tað, sum tit hava sæð har, má vera uttan fyri arbeiðstíð, tá fløkja onkuntíð kann koma í, um ikki øll skeltini verða beind burtur, til arbeiðið verður tikið uppaftur.

Hann vísir á, at tað eisini er ein møguleiki, at onnur gera seg inn á skeltini, so einki skil verður á uttan fyri vanliga arbeiðstíð. Eitt nú hava summi tað til stuttleika á náttartíð um vikuskiftini.

Tann møguleikan avsannar vakthavandi á Politistøðini í Runavík heldur ikki. Men hann hevur so lovað at farið framvið vegarbeiðinum Millum Fjarða, so helst man skil vera komið á, síðani myndirnar blivu tiknar og vit tosaðu við menninar.

Svensku Kattuglarnir dugdu at spæla

Skellilátur rungaði í Norðurlandahúsinum, tá 14 sjónleikarar í aldrinum 65 til 91 ár sýndu fram Tälje-Tokarnar

BEATE L. SAMUELSEN

Tað var ein skemtilig løta, ið svensku sjónleikarabólkurin Berguvarna, kattuglarnir, frá Södertälje høvdu í Norðurlandahúsinum mikukvøldið.

Skilligt var, at her hevði tú eldri fólk, sum dugdu at hugna sær saman, og sum dugdu at spæla sjónleik uttan at neyðugt var at líkjast svensku dulluni Pamelu Andersson.

Tað, sum leikararnir vildu hava fram um Tälju-Tokarnar, ið eru at sammeta við sokallaðu molbúgvara-søgur, ið finnast í øllum londum, bert undir øðrum heiti, fekk áskoðararnar at flenna hjartaliga.

Sjálvt um tú ikki skilti hvørt einasta orð, so var málið ikki nakar tvørleiki at skilja søgurnar, sum leikararnir í aldrinum 65 til 91 ár, í sjónleikinum sýndu fram saman við tónleiki, ið ein teirra stóð fyri.

Motivering krevst

Ikki er neyðugt hjá eldri fólki bert at seta seg á ein stól restina av lívinum, tá ein høgur aldur er rokkin.

At tað væl ber til at fáa nógv burturúr við samanspæli millum fólk í høgum aldri, prógvaðu leikararnir frá Södertälje hetta kvøldið.

Ikki smæddust teir heldur at vísa bæði ber bein, berar armar og beran yvirkropp. Hví skuldu teir eisini tað. Í leikinum spældu teir seg so væl inn í hvønn einstakan leiklut, at teir gloymdu seg sjálvar burtur.

Soleiðis skal tað vera, og soleiðis ber eisini til, um fólk eru, sum duga leggja teimum lag á og motivera eldri fólki til ikki bara at halda, at eingin hevur brúk fyri teimum.

Sjónleikaraskeið

Í Tälje-Tokarnar fingu vit eina ímyndan av fólki, sum ikki eru sum »vanlig« fólk, men sum eru virknir persónar, ið hava nógv hugskot og sum uttan at himprast eisini fremja hesi hugskot í veruleikanum.

Mai-Britt Ahlin, leikstjóri

Hjálpt Berguvarna at seta leikin upp og leggja teimum lag á hevur Mai-Britt Ahlin, sum áður hevur verið her.

Hon er 75 ára gomul, og skal m.a. hava skeið við føroyskum sjónleikaáhugaðum á sjónleikarastevnuni, sum verður í Hósvík hetta vikuskiftið.

Handilsstevnan skal nú gerast fastur táttur

Kristmund Kunoy fer longu í oktober at leggja til brots aftur við eini Handilsstevnu. Ein var hildin fyrr í ár, og fyrireikarin ætlar, at handilsstevnurnar skulu gerast fastur táttur á hvørjum ári.

DIA MIDJORD

HS-stevnan '97 verður hildin í døgunum frá 2. til 5. oktober í ítórttarhøllini á Hálsi. Fleiri fyritøkur og virki hava fráboðað luttøku, men nøkur pláss eru eftir.

Fyrireikarin hesaferð er tann sami, sum í mong ár hevur staðið við róðrið, tá ið handilsstevnurnar eru farnar av bakkastokki. Kristmund Kunoy hevur síðan einaferð í summar arbeitt við at leggja til rættis og fyrireika hesa stevnuna.

– Fleiri fyritøkur og virki hava sýnt áhuga at vera við á hesi stevnuni. Tað er eisini mín meting, at stevnurnar um heystíð eydnast frægari ann aðra tíðir á árinum, sigur Kristmund Kunoy.

Enn er ov tíðliga at siga, hvat verður á skránni hesar dagar fyrst í oktober, men Kristmund Kunoy hevur fingið fólk at skipa fyri undirhaldi, mótasýningum og øðrum, so har verður óivað okkurt nýtt og spennandi at síggja.

Skattabóklingur til oljuvinnuna

»Faroe Islands - Business and Investment Guide '97« skal geva útlendingum møguleikan at kunna seg um viðurskifti innan roknskap, skatt o.a. í Føroyum.

Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe ætlar ikki at liggja sjóvarfallið av sær í eini møguligari oljuvinnu her á landi. Í hesi vikuni er ein bóklingur latin úr hondum á enskum máli, ið gevur allar neyðugar frágreiðingar um skattaviðurskifti, roknskaparhættir og annað í Føroyum.

Í einum skrivi frá felagnum, sum Klaus Rasmussen, ríkisgóðkendur grannskoðari hevur undirskrivað, stendur, at bóklingurin er gjørdur fyri at nøkta ein part av tørvinum, sum útlendingar hava í hesum sambandi.

Í skrivinum stendur eisini, at ikki bert frálandavinnan hevur fingið eyguni upp fyri okkara samfelag. »Vit hava eisini staðfest áhuga hjá útlendingum fyri at virka innan aðrar vinnugreinar í Føroyum«.



Pílagrímar á ferð sunnanfyri

Jomfrú Maria skal í eini opinbering hava sagt, at eitt undur fer at henda, sum síggjast skal um eitt stórt øki við Meðalhavið.

Í næsta mánaði verður skipað fyri pílagrímsferð til Portugal og Spania.

Norðanfyri Lissabon, liggur lítla bygdin Fatima, har Jomfrú Maria vísti seg í eini opinbering í 1917.

Tað vóru trý børn, sum sóu hana. Jomfrú Maria kom til teirra við boðum um at venda um við bøn og fyri at bøta um heimsins óndskap og loynidómar í framtíðini.

Frá mai til oktober vísti Jomfrú Martia seg seks ferðir, og seinastu ferðina, 13. oktober hetta ár, vóru um 70.000 fólk vitni til undurið, har sólin dansaði og sýndi sjáldsamar litir.

Fatima er eitt kirkjuliga góðkent opinberingarpláss í Portugal. Kirkjuligir siðir og ritualir eru nakað fyri seg har, serliga um ta tíðina, tá ársdagurin fyri opinberingini er.

Fleiri opinberingar

Tá pílagrímsferðin byrjar, verður á veg til Fatima steðgað á í Garabandal í Norðurspania, sum eisini er eitt lítið stað, har opinberingar eru farnar fram.

2. juli í 1961 sýndi Jomfrú Maria seg í Garabandal.

Ta ferðina vóru tað fýra smágentur, sum sóu hana. Tær itu Conchita, Jacinta, Maria-Dolores og Maria-Cruz.

Opinberingarnar vóru javnan at síggja hara líka fram til 13. november 1965, upplýsir Erla Simonsen, tlf. 21465, ið kann greiða nærri frá hesum.

Í Garabandal hevur Jomfrú Maria sagt, at ein ávaring fer at koma til alla mannaættina og at tað síðani fer at henda eitt undur, sum kemur at kunna síggjast í Garabandal og í øllum fjallalendinum har umleiðir. Eisini pávin fer at síggja hetta, har hann er staddur.

Ætlaða pílagrímsferðin verður frá 6. til 18. oktober.

B.

Frændir fyri seinastu ferð á hesum sinni

Seinastu vikuskiftini hava Frændir havt konsertir ymsastaðni í Føroyum, og í kvøld verður so tann seinasta av hesum konsertunum.

Konsertin verður í ítróttarhøllini í Runavík.

Tá slíkar konsertir eru í Eysturoynni, verða tær sum oftast hildnar í høllini á Kambsdali, men eftirsum føroyska fótbóltslandsliðið spælir á Toftum í dag, varð hildið, at konsertin tað sama kundi vera í Runavík.

Tað eru nøkur ár liðin, síðani Frændir seinast vóru at hoyra í Runavík.

Seinasta konsertin, Frændir høvdu í Runavík, var fyri Oyggjaleikanevndina, og tá komu 900 fólk.

Seinasta leygarkvøld høvdu Frændir eina rimmar konsert á Hálsi í Havn, og tá vórðu 1100 atgongumerki seld.

Konsertin í kvøld verður allarhelst seinasta høvi at hoyra Frændir »live« í nógv ár.

Fleiri av limunum fara niður aftur til Danmarkar í næstu viku, og ivasamt er, nær ella um teir koma saman aftur til konsert.

elj